## … um útvísingar

– Eg havi ikki fingið nógvar tilsamans gjøgnum ár og dag, men nú komu nakrar innanfyri eitt heilt stutt tíðarskeið. Fyrsta útvísingin, eg nakrantíð fekk, var í einum dysti við U16 har eg bjargaði við hondini, og fyrsta útvísingin hjá mær í føroyskum fótbólti yvirhøvur, var ímóti AB í summar. Síðani varð eg útvístur í dystinum móti Kolding herfyri, og omaná tað havi eg karantenu nú á landsliðnum, eftir ov nógv gul kort. Eitt óheppið tíðarskeið, tí eg fái ikki nógv kort vanliga.



## … um Norðoyatunnilin

– Norðoyatunnilin eri eg glaður fyri. Tað er heilt fantastiskt bara at kunna koyra til og frá Klaksvík. Vit spara eina rúgvu av tíð, so tað er lekkurt við honum.

# gott »studiejob«





*– Ein fortreyt fyri at standa seg væl á vøllinum er, at tú trívist uttan fyri vøllin. Tað geri eg her í Keypmannahavn, sigur Atli Danielsen*
*Myndir: Símun Jóannesarson*

## Fakta

Navn: Atli Danielsen
Føðingardagur: 15. august 1983
Heimbýður: Klaksvík
Foreldur: Finngerð og Ámund Danielsen
Systkin: Karstin, Joan og Thorvald.
Giftur Súsannu Danielsen
Útbúgvin skrivstovumaður

landsliðnum.

– Men tá eg byrjaði í bestu føroysku fótbóltsdeildini, var tað faktiskt sum høgri bakkur, fortelur Atli og vísir soleiðis á, at plássið kortini ikki er honum heilt fremmant.

Heldur ikki er føroyskur fótbóltur honum fremmandur, hóast hann nú hevur adressu í Keypmannahavn.

– Eg fylgi væl við og lurti altíð eftir fótbóltinum í útvarpinum, sigur klaksvíkingurin, sum hóast lívið sum lesandi fótbóltsleikari á flatlondum framvegis hevur ein dreym í føroyskum fótbólti: at gerast føroyameistari.

Hetta sleppur hann tó at droyma um í eina tíð aftrat, men Atli hevur aðrar stórar og minniligar upplivingar í fótbólti.

– Dystirnir í Skotlandi og Írlandi frammanfyri hálvthundraðtúsund áskoðarum vóru nakað heilt serligt. Serliga orsaka av teirra áskoðarum, sum eru nakað fyri seg. Eisini var tað ótrúligt at møta Frankaríki og Italia.

### Giftist í summar

Á privata frontinum hevur Atli eisini roynt nakað heilt serligt í summar. Í augustmánað giftust hann og unnustan Súsanna. Og fyrireikingar til brúdleyp í Føroyum og fótbóltsdystir í Danmark, vóru eitt sindur av eini kabal at fáa at ganga upp.

– Eg var heima fyrst í juli. Fór niður 11. og heima aftur í Føroyum tann 22 juli. 1. august var eg aftur niðri og spældi dyst, áðrenn eg fór heim 6. Tann 11. august giftust vit, og 15. august vóru vit aftur í Danmark, so har hendi eitt sindur av hvørj- um flennir Atli, hvørt næsta avbjóðing verður í Ukraina. Hann er leikbannaður til dystin móti Fraklandi, men verður partur av ferðalagnum, sum skal dystast í Ukraina mikudagin.